gult cyan magenta svart

TILTØK

Ebenezer
Í dag verður barnafest. Fyri børn 7 ár og yngri kl. 15 og fyri børn 8 ár og eldri kl. 18.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Nýggjársaftan kl. 11: Møti. Nýggjársdag kl. 19: Gudstænasta í Dómkirkjuni. Mikudagin kl. 15: Bøn. Nýggjársveitsla fyri soldatum og vinum 12. jan. Tilmelding innan 7. jan.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 byrjar nýggjársstevnan í Badmintonhøllini.
Í morgin kl. 14 undirvísing v/ Símun Absalonsen og Jóan Petur Johannesen, kl. 20 møti v/ Paula Høj.
Nýggjársaftan kl. 11 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 01.00 nýggjárskonsertin.
Nýggjársdag kl. 18 møti v/ Rúna Rasmussen.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo
http://www.filadelfia.fo

KFUM og KFUK í Havn
Í dag, 29. des., kl. 19.30 í KFUK: Jólaveitsla fyri vaksin. Inngangur við Hans Jacob Joensen, bispi.

Meinigheitshúsið í Havn
Nýggjársaftan verður møti kl. 18 v/ Sverra Steinhólm.

Ørkin, Saltangará
Møti verður aftur í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini sunnudagin 7. januar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Nýggjárskvøld verður møti kl. 20 við Jens Vestergård, Ebba og Nimrodd syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Leygardagin kl. 15. Nýársveitsla fyri børn, kl. 19 vaksin.
Nýggjársaftan kl. 11 breyðbróting, kl. 23 bønarfundur.
Nýggjársdag kl. 18 evangel. fundur. Ónsdagin 3. kl. 20 bønarfundur.

Betania, Skopun
30. des. nýggjársveitsla í Betania kl. 19.
Nýggjársdag kl. 17 jólaveitsla í Zion. Verið vælkomin.

Zion, Sandur
Nýggjársdag kl. 17 jólaveitsla. Verið vælkomin.

Missiónshúsið í Leirvík
Jólafestin verður leygarkvøldið 30. des. kl. 19. Á skránni verður m.a. jólaboðskapur, jólahugni, sangur og Luciagongd. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Saron, Vestmanna
Nýggjársaftan kl. 18: Evangeliskt møti.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundir verða í kvøld kl. 20-21 og kl. 22.30-23.30.

Al-anon
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

Javni N. Finsensgøta 32
Mánadag stongt.
Týsdag, mikudag og hósdag opið kl. 11-14
Fríggjadag kl. 11-15
Tlf. 314827 Fax 310557
e-mail: javni@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail: sara@post.olivant.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Føroyskt møti í Ålborg
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyskt barnamøti
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Før. gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14. (Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Malta, Hirtshals
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11. Sunnudagsskúli er samstundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Teldupostur: ffo@post.gs

Føroyingafelagið í Reykjavík
Øldudóls 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Svøríki
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu West fahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.

Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 30. des. hava Martha og Edvin Poulsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Veitsla er í Karup Forsamlingshúsi. Adressan er: C/o Petur Thomsen, Madumsøyvej 4, Hellum, 9520 Skørping.

BRÚDLEYP

Í dag, 29. des., giftast Mariane Haraldsen úr Miðvági og Fróði Olsen av Argjum. Tey eru at hitta heima í Viðargøtu 50 eftir kl. 21.00.

Leygardagin 30. des. kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Hildur Debes Winthereig og Eyðun Lindenskov Samuelsen, bæði úr Havn. Veitsla verður fyri innbodnum í HB-húsinum.

Leygardagin 30. des. giftast í Avedøre kirke, Guðrið Jákupsdóttir Joensen, Tórshavn og Jan Forná, Tvøroyri. Brúdleypsadr: Grønbækvej 4, 2650 Hvidovre.

Leygardagin 30. des. kl. 14.00 giftast í Hvalvíkar kirkju Olga Joensen Dys, Hvalvík, og Steinar Hansen, Toftir.
og
kl. 16.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Annelisa Joensen, Undir Gøtueiði, og Dan Hansen, Toftir.
Brúdleypið verður í Ítróttarhøllini í Runavík kl. 19.00.

PRÓGV

Oddvá Nielsen úr Havn hevur lokið prógv sum ídnaðarlaborantur á Laborantskúlanum í Keypmannahavn. Læruplássið hevur verið Landbúnaðarháskúlin í Keypmannahavn.

TILTØK

Føroyingar í Noregi
E-mail: foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail: ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis: Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túnatosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum. Heimasíða: www.faroehouse.dk
E-mail: postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir: mánadag–fríggjadag: kl. 16.00–19.00.

Vika 52 – 27. desember
Vinnaratøl: **10 - 11 - 20 - 29 - 37 - 48**

Eykatøl: **24 - 43**

6 vinnaratøl:	**0,- kr.**
5 vinnarat.+ eykatal	**520.651,- kr.**
5 vinnaratøl:	**3.820,- kr.**
4 vinnaratøl:	**126,- kr.**
3 vinnaratøl:	**32- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

Palleba við skerdan lut sum vanligt

VIÐMERKING
Bill Justinussen

Høgni Hoydal varaløgmaður nevndi í talu síni um § 19 kanningina, at landskassin kom at hanga upp á so at siga alla skuld í samfelagnum, tá kreppan rakti sum avleiðing av áttatiárunum. Eg vil enn einaferð minna á, at ein bólkur í samfelagnum varð meiri órættvíst viðfarin enn øll hini, tá alt varð gjørt upp, nevniliga sethúsaeigararnir.

Skuldarbundnu sethúsaeigararnir
Hesir vóru fyri tí vanlagnu, at teir av politikkarunum fyrst í 90-unum ikki vórðu viðgjørdir á jøvnum føti við vinnulívið og bankan. Og í veruleikanum vóru hetta teir einastu, sum ein landskassi kundi sigast at hava moralska skyldu mótvegis. Hart spentu sethúsaeigararnir, sum yvir eina nátt mistu helvtina av virðinum í ogn síni orsakað av einum pennastroki á onkrum donskum skriviborði (hetta burdi Høgni vitað alt um, tá hugsað verður um víðagitnu sjónvarpssendingar hansara) vóru veika liðið í ketuni, men hesir fingu onga hjálp. Hinvegin var tað alt umráðandi at bjarga bankunum, sum helst vóru størsta orsøkin til kreppuna. Og við teimum vinnulívinum m.a. fiskavirkjunum.

Føroya Banki svíkur
Føroya Banki fekk um landskassan frá føroyska skattgjaldaranum milliarda-stóra upphædd fyri at kunna avseta til komandi tap. Men hvat gjørdi bankin? Hann avskrivaði í stórum uppá vinnulívskundar, meðan sethúsaeigararnir, sum sjálvandi eisini áttu at verið viðgjørdir eftir sama leisti, framvegis tann dagin í dag mugu knossast við hesi gomlu lán. Nógv standa framvegis í skuld uttan at hava ogn aftanfyri.

Bankaroknskapirnir í 90-unum
Hyggja vit at roknskapunum hjá Føroya Banka seinastu fimm árini, er tað heilt merkisvert at staðfesta, at høvuðsparturin av teirra óvanliga góðu úrslitum stava frá afturvunnum burturleggingum, t.e. tap, sum allíkavæl ikki eru tap. Hetta merkir, at bankin, tá fólk eru byrjað at fóta sær aftur, so við og við hevur gjørt nógv krøvi galdandi, sum hann annars við peningi úr landskassanum (frá Palleba) ætlandi skuldi strika. Soleiðis hevur bankin umframt hjálpina úr landskassanum eisini fingið innaftur pening, sum hann upprunaliga hevði avskrivað. Við øðrum orðum hevur kreppan positivt givið bankanum dupulta inntøku burturúr sethúsafintuni. Ikki løgið, at Føroya Banki liggur ovast í danska kongaríkinum, tá mett verður eftir eginpeningsavkasti.

Møguleikin framvegis tilstaðar
Møguleikin fyri at hjálpa hesum, sum enn eru í trongstøðu, er framvegis tilstaðar. Tí í nógv tey komandi árini eru hesi jú dømd til at gjalda niður uppá skuld fyri sethúsini, sum onkur annar nú eigur og hevur rindað helvtarprís fyri. Dømini eru fleiri um, at bankin seldi hús fyri 4-500.000, sum stóðu í knappari millión. Eigarin misti húsini og sat eftir við nøkrum hundrað túsund í skuld. Nøggi eigarin flutti inn fyri hálvan prís og situr í dag við húsum, sum aftur hava eitt virði uppá 1 millión. Var tað ikki rímiligt, at bankin strikaði skuldina hjá fyrrverandi húsaeigaranum, tá bankin jú frammanundan hevur fingið fult gjald fyri lánið umvegis landskassan??

Hvat ger landsstýrið?
Landskassin er størsti partaeigarin í Føroya Banka. Hvat gera teir fyri at hjálpa hesum, sum so órættvíst vórðu viðfarin? Onki higartil.

Skal bankin hjá Palleba nú seljast?
Jú, eitt ger landsstýrið. Teir hava nú sett ein arbeiðsbólk niður við tí arbeiðssetningi at meta um virðini av ognum landskassans við sølu fyri eyga. Føroya Banki, sum Palleba hevur goldið í dýrum dómum fyri, og sum í dag er størsti einstaki inngjaldari í landskassan við skatti og vinningsbýti, skal nú seljast til tey ríku. Og helst til onkran, sum í síni tíð skyldaði so nógv, at hann tað sama kundi sanerast og setast í gongd aftur, sum um onki var hent. Hví skal landskassin avhenda hesa ogn alra føroyinga? Hví ikki lata bankan vera almennan, táið tað nú gongur so væl, sum tað ger? Tá sleppa vit møguliga undan, at alt ov nógv svans tekur seg uppaftur. Verður bankin nú seldur, er tað bert talan um fullkomið svik móti øllum føroyingum. Nú eiga vit hann øll, tí vit hava øll goldið fyri hann.



Fríggjadagin 29.12. kl. 19[30] Fríggjadagin 29.12. kl. 21[15]
Leygardagin 30.12. kl. 19[30] Leygardagin 30.12. kl. 21[15]

HAVNAR BIO *ynskir øllum viðskiftafólkum sínum eitt gott nýggjár*

HAVNAR BIO
Tlf. 311956

Fríggjadagin 29.12. kl. 21[00] Fríggjadagin 29.12. kl. 24[00]
Leygardagin 30.12. kl. 21[00] Leygardagin 30.12. kl. 24[00]

Fríggjadagin 29.12. kl. 16[00] Fríggjadagin 29.12. kl. 17[45]
Leygardagin 30.12. kl. 16[00] Leygardagin 30.12. kl. 17[45]

Fríggjadagin 29.12. kl. 23[30] Leygardagin 30.12. kl. 23[30]

Fríggjadagin 29.12. kl. 19[00] Leygardagin 30.12. kl. 19[00]

Fríggjadagin 29.12. kl. 16[30] Leygardagin 30.12. kl. 16[30]

www.in.fo/havnarbio